Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	15.01.2026
Mál nr.:	26/01807
Málsviðgjørt:	EØ / OyS
Ummælisfreist:	20.01.26- 27.01.26
Eftirkannað:	28.01.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (Barnaverndarlógin)
(Samsýning til fosturforeldur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 27. mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 29, stk. 4 og 5 verða strikað.

2. Aftan á § 29, men áðrenn yvirskriftina yvir § 30, verður sett:

"**§ 29 a.** Samsýningin sbrt. § 29, stk. 2 er 137,02 kr. um samdøgrið fyri hvørt fosturbarn.

§ 29 b. Eitt fast gjald um samdøgrið verður rindað til vistarhald og klæði til barnið sbrt. § 29, stk. 3. Tá upp til 2 børn eru í somu fosturfamilju, er gjaldið fyri hvørt barnið ávikavist 224,76 kr. til børn undir 10 ár, og 236,59 kr. til børn 10 ár og eldri. Tá fleiri enn 2 børn eru í somu fosturfamilju, er gjaldið 209,55 kr. fyri hvørt barnið.

§ 29 c. Eitt fast gjald verður um vikuna rindað til lummapening til barnið sbrt. § 29, stk. 3. Tá barnið er:
1) 3-6 ár er gjaldið 45,65 kr.
2) 7-10 ár er gjaldið 97,01 kr.
3) 11-13 ár er gjaldið 125,54 kr.
4) 14-15 ár er gjaldið 199,72 kr.
5) 16 ár og eldri er gjaldið 313,84 kr.

§ 29 d. Útreiðslur til stovnan og útbúnað í sambandi við fosturuppihald kunnu rindast fosturforeldrum sbrt. § 29, stk. 3, tá ið barnið verður latið teimum, við upp til 9.476,89 kr.

§ 29 e. Um barn verður sent til fosturforeldur í Danmark, eru donsku upphæddirnar fyri samsýning, lummapening, stovnan og útbúnað galdandi.

§ 29 f. Afturat samsýningini í § 29 a verður lagt gjald til arbeiðsloysisskipanina, gjald til barsilsgrunnin, gjald til

arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og bundna eftirlønargjaldið sbrt. § 2 í løgtingslóg um eftirløn.

§ 29 g. Um talan er um eitt barn við sera stórum avbjóðingum, kunnu fosturforeldrini samsýnast við upp til tríggjar ferðir samsýningini sbrt. § 29 a, umframt eina ferð føstu gjøldini í §§ 29 b og 29 c.
Stk. 2. Um talan er um eitt barn við óvanliga stórum avbjóðingum, sum tí krevur heilt serliga røkt frá fosturforeldrunum, kunnu fosturforeldrini samsýnast við upp til sjey ferðir samsýningini sbrt. § 29 a, umframt eina ferð føstu gjøldini í §§ 29 b og 29 c.

§ 29 h. Um talan er um eitt pinkubarn undir eitt ár, kunnu fosturforeldrini samsýnast við upp til sjey ferðir samsýningini sbrt. § 29 a, umframt eina ferð føstu gjøldini í §§ 29 b og 29 c.

§ 29 i. Samsýning sbrt. §§ 29 g og 29 h kann bert veitast í 3 mánaðir í senn. Eftir hetta tíðarskeið skal metast, um tiltakið virkar eftir ætlan, og um ráðiligt er at halda áfram við tiltakinum.

§ 29 j. Samsýningar og veitingar sbrt. §§ 29 a, 29 b, 29 c og 29 d verða árliga javnaðar sbrt. løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.“

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Javning av samsýning til fosturforeldur fylgir javningini av almannaveitingum. Tað merkir, at tá pensjónir, barnagjald og ein rød av øðrum veitingum hækka, tá hækka samsýningar til fosturforeldur við sama prosentsatsi.

Upprunaliga varð javning av almannaveitingum ásett í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting av almannaveitingum. Ásett var í løgtingslógini, at almannaveitingar skuldu javnast við 4%. Hetta var uttan mun til gongdina í samfelagnum viðvíkjandi lønar- og prísvøkstri. Síðsta árið, at javnað varð við 4%, var í 2008.

Síðani tá hava skiftandi landsstýri politiskt tikið avgerð um at lækka javningina við tí endamáli at tálma útreiðsluvøkstrinum á fíggjarlógini. Tískil varð løgtingslógin broytt – nærum árliga fyri at halda javningini á einum lægri satsi. Í sambandi við fíggjarlógaruppskotini hava landsstýrini lagt uppskot fyri Løgtingið (broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum), sum hava ásett javningarprosentið fyri komandi árið.

Javningarprosent 2002-2021:
2002-2008: 4%
2009-2010: 3%
2011: 1%
2012: 0%
2013: 1,7%
2014: 0,85%
2015-2021: 0%

Javningarprosentini omanfyri eru sum nevnt ásett í lóg og byggja tí ikki á nakað annað enn politiskar avgerðir.

Kommunurnar mæla nú til at hækka gjaldið til vistarhald og klæði til børn, sum eru hjá fosturfamilju. Víst verður á, at av tí at gjaldið til vistarhald hevur staðið í stað árini 2015-2021, hevur tað ført við sær, at munurin millum verandi gjald og tað, sum hevði verið galdandi við regluligari javning, er vaksin munandi. Hevði upphæddin til vistarhald verið javnað við trimum prosentum árliga í tíðarskeiðnum frá 2015 til 2025, var dagliga upphæddin í dag, tá upp til 2 børn eru í somu fosturfamilju, kr. 224,76 til børn undir 10 ár ístaðin fyri verandi kr. 180,42, og kr. 236,59 til børn eldri enn 10 ár í staðin fyri verandi kr. 189,91. Tá fleiri enn 2 børn eru í somu fosturfamilju, hevði dagliga upphæddin verið kr. 209,55 fyri hvørt barnið ístaðin fyri verandi kr. 168,21. Hetta merkir, at fosturforeldur í dag fáa á leið kr. 1.300 minni um mánaðin fyri hvørt barn, enn tey høvdu fingið við regluligari javning.

Hækkingin av gjaldinum til vistarhald og klæði er ætlað at tryggja fosturforeldrum rímiligt endurgjald fyri tær útreiðslur, ið standast av at hava barn til fosturs. Hetta verður mett at kunna hava jaliga ávirkan á bæði trivnað og umsorgan hjá hesum børnum, og tekur Barna- og útbúgvingarmálaráðið tí undir við tilmælinum frá kommununum. Tað eru kommunurnar, sum rinda gjaldið til vistarhald og klæði, og sum tí fáa meirútreiðslur av lógaruppskotinum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur eftirkannað, um til ber at hækka gjaldið í kunngerð í sambandi við árligu javningina av samsýningini til fosturforeldur, men letur hetta seg ikki gera, tí slíkar veitingar eiga at verða ásettar í lóg og ikki í kunngerð. Tískil er neyðugt at broyta løgtingslógina um barnavernd, soleiðis at nøktandi lógarheimild fæst til vegar.

Talan er bert um ta einu veitingina, sum verður hækkað við fyriliggjandi broyting, men er Barna- og útbúgvingarmálaráðið farið undir eina tilgongd at eftirmeta fosturforeldraskipanina, har ein lýsing av einari samsýningarskipan, sum stuðlar undir endamálinum við fosturforeldraskipanini skal gerast.

1.2. Galdandi lóggáva

Samsýningar til fosturforeldur er ásett í barnaverndarlógini, løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd. Lógin gevur eitt nú heimild at veita fast gjald til vistarhald og klæði til børn, sum eru hjá fosturfamilju. Samsýningar og veitingar sambært lógini verða árliga javnaðar í kunngerð, har allar upphæddirnar framganga.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at hækka gjaldið fyri vistarhald og klæði, soleiðis at tað verður ájavnt við tað, sum gjaldið hevði verið, um so varð, at gjaldið hevði verið javnað við 3% árliga í árunum 2015-2025, eins og kommunurnar mæla til.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur við sær, at allar samsýningar og veitingar til fosturforeldur framganga í sjálvari lóggávuni, og ikki í kunngerð. Upphæddirnar verða javnaðar hvørt ár sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar, eins og tað hevur verið gjørt undanfarin ár.

Lógaruppskotið tryggjar tí greiða heimild til at hækka samsýningina til fosturforeldur, samstundis sum allar upphæddir verða ásettar í lóg, sum mett verður er skilagott.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Ummælispartarnir eru:
Hini stjórnarráðini
Kommunufelagið
Barnaverndarstovan
Fosturforeldrafelagið

Einans Fosturforeldrafelagið hevði viðmerking til uppskotið, har tey siga seg fegnast um, at upphæddin fyri vistarhald nú verður hækkað, og mæla tey harnæst til, at okkurt verður gjørt við samsýningina í sambandi við eftirmetingina av fosturforeldraskipanini, sum er ávegis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær ávísar fíggjarligar meirútreiðslur hjá kommununum, sum rinda samsýningarnar til fosturforeldur, undir hesum gjaldið til vistarhald og klæði, sum nú verður hækkað. Ongar fíggjarligar avleiðingar verða fyri landið.

Viðmerkjast skal, at uppskotið tekur støði í tilmæli frá kommununum um at hækka gjaldið til vistarhald og klæði.

Av tí at talan er um hækkan av gjaldi, sum longu í dag verður umsitið, standast ikki fíggjarligar avleiðingar vegna umsitingarligar avleiðingar.

Sambært tølum frá Kommunufelagnum eru í miðal 85 børn til fosturs. Við hækkaðu gjøldunum fáa hesi umleið kr. 1.300 meira um mánaðin, ið svarar til, at gjaldið til vistarhald og klæði samanlagt hækkar við 1,3 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, vísandi til, at talan er um gjald til fosturforeldur, sum barnaverndartænastur longu umsita.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri fosturforeldur, sum nú fáa eitt hægri gjald útgoldið til vistarhald og klæði til barnið.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS.**
   Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við EMRS.

2) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.**

Lógaruppskotið verður mett at vera í samsvari við Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið inniheldur áseting um gjøld, sum í dag verða umsitin sambært kunngerð, men sum nú verða kjølfest í lóg ístaðin. Talan er ikki um nøkur nýggj gjøld, men bara um hækkan av gjaldinum til vistarhald og klæði, sum fylgir tilmælinum frá kommununum, sum umsita og gjalda hetta.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur greiðari heimild til at veita gjald til fosturforeldur, soleiðis, at heimild til at hækka gjaldið til vistarhald og klæði, nú eisini verður staðfest í lóg.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Lógaruppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru ávístar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

1. § 29, stk. 4, sum gav heimild til at áseta nærri reglur um samsýning, verður strikað vísandi til at samsýningarnar nú verða settar inn í sjálva lógina. Eisini verður § 29, stk. 5 strikað, tí ásetingin er flutt til § 29 j.

2. Í § 29 a er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025 viðvíkjandi føstu samsýningini fyri hvørt barnið. Samsýningin verður roknað sum byrjað samdøgur. Samsýningin her verður veitt, tá talan er um børn, sum eru lík øðrum børnum á sama aldri, og sum hava brúk fyri umsorgan, uppaling og uppihaldi, og har eingi serlig krøv eru til fosturforeldrini, t.e., at tað ikki er neyðugt at broyta gerandisdagin, hvørki sosialt ella arbeiðsligt.

   Í § 29 b er talan um samsýning, sum er at rokna sum endurgjald fyri allar vanligar útreiðslur í sambandi við, at barnið uppiheldur sær hjá fosturforeldrunum. Orðingin er tann sama sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025, men sjálv upphæddin er hækkað sambært tilmælinum frá kommununum.

   Í § 29 c er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Lummapeningur verður veittur sambært leiðbeining um lummapening til børn, sum eru sett heiman, sí leiðbeining nr. 8001 frá 19. oktober 2020, og er tað kommunan, sum rindar lummapening til børn, sum búgva hjá fosturforeldrum, meðan landið rindar lummapening til børn, sum búgva á stovni hjá landinum.

   Í § 29 d er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Samsýning her er til útbúnað, sum barnið hevur brúk fyri, meðan tað er hjá fosturforeldrunum, eins og onnur børn hava brúk fyri.

   Í § 29 e er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Henda áseting tekur hædd fyri, at kostnaðurin fyri uppihald o.a. er annarleiðis í Danmark enn í Føroyum. Tí er neyðugt at fylgja teimum upphæddum, sum eru ásettar í Danmark, tá børn eru hjá fosturforeldrum í Danmark.

   Í § 29 f er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Her verður ásett, at goldið eisini verður gjald til barsilsgrunnin, gjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og bundna eftirlønargjaldið, sambært § 2 í løgtingslóg um eftirløn.

   Í § 29 g er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Í teimum førum, tá greitt er, at tørvur er á stuðli, verður samsýningin hækkað, tó í mesta lagi faldað við 7 fyri barnið. Tá verður uppgávan oftast hildin at vera so mikið krevjandi, at annað av fosturforeldrunum má vera um barnið fulla tíð. Hugtøkini verða nýtt samsvarandi galdandi praksis á økinum, og metingin verður gjørd ítøkiliga av Fosturforeldraskipanini í hvørjum einstøkum føri. Samsýningin verður javnan endurskoðað, meðan barnið er til fosturs, so hon til eina og hvørja tíð er hóskandi í samsvari við uppgávuna sum fosturforeldur.

Í § 29 h er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Her er talan um samsýning, sum viðvíkur heilt smáum børnum, og fylgja hesar upphæddirnar teimum somu sum í § 29 g vísandi til, at tað eisini her er talan um eyka stóran innsats frá fosturforeldrunum, vísandi til at barnið er so lítið.

Í § 29 i er talan um somu orðing og upphædd sum í kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025. Ásetingin skal tryggja, at samsýningin alla tíðina fylgir tørvinum hjá barninum.

Í 29 j er talan um somu orðing sum var í § 29, stk. 5, sum nú verður strikað og sett aftaná ásetingarnar um allar upphæddirnar. Talan er tí bert um somu orðing undir aðrari grein.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Kunngerð nr. 214 frá 17. desember 2025 fer úr gildi sum avleiðing av, at § 29, stk. 5 í løgtingslóg um barnavernd verður sett úr gildi.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 17. februar 2026

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Fylgiskjøl
1. Javntekstur
2. Hoyringarsvar frá Fosturforeldrafelagnum